# Fiskiflotin liggur svínabundin

**Soleingi, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag ikki eru samd um samráðingargrundarlagið, gerst einki**

SÁTTMÁLASTRÍÐ
*Vilmund Jacobsen*



*Meginparturin av fiskiflotanum liggur, nú sáttmálastríð er millum Føroya Skipara-og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag.*

*Mynd: Rúna Sivertsen.*

Sum kunnugt, slitnaðu samráðingarnar millum Føroya Skipara-og Navigatørfelag øðrumegin og Føroya Reiðarafelag hinumegin, 18. desember. Verkfall er, og meginparturin av fiskiflotanum liggur. Stríðið snýr seg um nýggja sáttmálan fyri yvirmenninar umborð á føroysku fiskiskipunum. Hóast semingsmaður var komin uppí samráðingarnar, bar ikki til at fáa nakra semju, tí partarnir vóru enn ikki samdir um sjálvt samráðingargrundarlagið.

Tað var Føroya Skipara- og Navigatørfelag, sum segði sáttmálan við Føroya Reiðarafelag upp at fara úr gildi, 1. desember 2002. Sáttmálin umfatar skiparar og stýrimenn við øllum fiskiskipum. Í fyrsta lagi vóru tveir fundir millum partarnar. Á fyrra fundinum legði Føroya Skipara- og Navigatørfelag síni krøv fram, og á seinna fundinum legði Føroya Reiðarafelag síni tilboð og krøv fram. Á seinna fundinum boðaði felagið hjá skiparum og navnigatørunum frá, hvat felagið kundi góðtaka, og hvat teir ikki kundu góðtaka.

## Broytti sáttmálan

Føroya Reiðarafelag segði seg ikki vilja samráðast uttan so, at FSN fráségði sær sáttmálan, sum feløgini skrivaðu undir, 12. januar 1999. FSN skuldi vátta, at felagið vildi góðtaka at samráðast út frá einum broyttum sáttmála - sum varð er broyttur eftir, at hann upprunaliga varð undirskrivaður við seinastu samráðingar.

- Tá ið sáttmálin varð undirskrivaður í 1999, vórðu umfatandi broytingar gjørdar. Tí spurdu vit, um tað ikki kundi lata seg gera at rætta sáttmálan, um okkurt var komið skeivt fyri, men hetta vildi semingsstovnurin ikki hoyra talan um.

Ellintur M. Abrahamsen, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, sigur, at nakrar dagar seinni komu kortini boð frá semingsstovninum um, at onkrar broytingar vóru gjørdar, tí mistøk vóru gjørd í skrivaða tekstinum.

- Men hvørki semingsstovnurin ella reiðarafelagið tosaði við okkum um hesar broytingar. Úrslitið gjørdist, at reiðarafelagið fór at gjalda eftir tí broytta sáttmálanum. Hetta endaði við sakarmáli, har vit kravdu semingsstovnin dømdan at viðurkenna, at ein sáttmáli, sum er undirskrivaður, kann ikki broytast.

FSN fekk viðhald í frá Føroya Rætti og bað tískil Reiðarafelagið boða limum sínum frá, at gjaldast skuldi eftir undirskrivaða sáttmálanum. Men tað broytti ikki støðuna, og krav liggur nú inni um, at Reiðarafelagið skal gjalda sambært tí, sum er undirskrivað.

Ellintur vísir á, at eitt, sum Reiðarafelagið broytti, var eykaparturin hjá 2. stýrimanni við nótaskipum undir 1500 BRT. Fyrr fingu hesir 1/4 part eyka, men í sáttmálanum, sum gjørdur varð, 12. januar 1999, er eykaparturin hækkaður til 1/2 part.

## Av søluvirðinum

– Um aðrar eykapartar stendur í undirskrivaða sáttmálanum, at teir skulu roknast av søluvirðinum, men reiðarafelagið vil hava, at tað skal vera av avlopinum, soleiðis at útreiðslurnar skulu dragast frá frammanundan, sum gjørt hevur verið frammanundan.

- Nú vit koma aftur til samráðingar, krevur Reiðarafelagið, at vit skulu samráðast út frá sáttmálanum við tí broyttu orðingini og ikki útfrá sáttmálanum, sum er undirskrivaður. Tað kann felagið ikki góðtaka. Tí boðaðu vit reiðara-felagnum frá, at slepti felagið ikki kravinum, var ongin møguleiki at koma longri við samráðingunum, og at tað tí varð neyðugt at senda boð eftir semingsmanninum.

Semingsmaðurin varð boðsendur og longdi sáttmálan nakrar dagar, men 18. desember lýsti so Føroya Skipara- og Navigatørfelag verkfall, tí partarnir kundu ikki semjast um sjálvt samráðingargrundarlagið, og tá er ikki nógv hjá semingsmonnunum at taka sær fyri.

Føroya Skipara- og Navigatørfelagið vil eisini hava greiði á nøkrum viðurskiftum, eitt nú í teimum førum, har fiskur verður frystur umborð. Somuleiðis er sáttmálin við Norðborg ongantíð fingin í lag, og tað vil felagið hava nú. Felagið vil eisini hava ymisk viðurskifti nótabátunum broytt.

- Hetta er fyri ein part afturvendandi krøv, men summi mál eru so gomul, at tey mugu fáast í rættlag nú, sigur Ellintur Abrahamsen.

# Ber ikki til at samráðast við Jákup Sólstein

**– Eg vil siga, at tað hava ongar veruligar samráðingar verið við Føroya Reiðarafelagið, síðan Jákup Sólstein gjørdist formaður í felagnum, sigur Ellintur M. Abrahamsen**

SÁTTMÁLASTRÍÐ
*Vilmund Jacobsen*



*– Eg dugi slett ikki at meta um, hvussu drúgt hetta stríðið kann gerast, sigur Ellintur M. Abrahamsen, formaður í Føroya Skipara-og Navigatørfelag*

Formaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag, Ellintur M. Abrahamsen, heldur lítið um tær samráðingar, sum verið hava við Føroya Reiðarafelag, síðan Jákup Sólstein gjørdist formaður í reiðarafelagnum fyri umleið 10 árum síðan.

– Eg vil siga, at tað hava ongar veruligar samráðingar verið millum feløgini í hesum tíðarskeiði, tí alt, sum vit hava lagt fram hesi árini, er feiðað av borðinum av formanninum, Jákupi Sólstein.

Ellintur heldur, at tað, sum brennur heitast hjá reiðarafelagnum í stríðnum millum feløgini, er eykaparturin hjá 2. stýrimanni, sum var ein partur av semingsuppskotinum seinast.

– Her heldur reiðarafelagið uppá, at talan er um ein skrivifeil í undirskrivaða sáttmálanum, at 2. stýrimaður við nótaskipum fær ein hálvan part eyka í staðin fyri ein fjórðingspart. Men hetta halda vit ikki er rætt, tí hetta var eitt av okkara krøvum við seinastu samráðingar. Jákup Sólstein hevur sagt, at hálvi eykaparturin er órættvísur mótvegis Fiskimannafelagnum og Maskinmeistarafelagnum, men Fiskimannafelagið hevur ongar eykapartar, og hjá Maskinmeistarafelagnum eru hesi viðurskifti komin uppá pláss.

Ellintur heldur ikki, at Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur nakra orsøk til at geva eftir mótvegis reiðarafelagnum og fer at halda fast um verandi krøv.

Í dag hevur felagið hjá skiparum og navigatørunum aðalfund, og tá verður aktuella sáttmálastøðan náttúrliga eitt av umrøðuevnunum.

## Skipini liggja

At kalla allur fiskiflotin er raktur av verkfallinum uttan tey fáu skip, sum ikki eru heima nú um jóla- og nýggjárshalguna. Skip, sum eru til fiskiskap, eitt nú langfaraskip, hava sambært sáttmálanum ikki skyldu til at bróta túrin av.

Ellintur sigur, at felagið gav garnaskipunum, sum høvdu gørn standandi, tá ið verkfallið varð lýst, 18. desember, loyvi til at draga gørnini, tí felagið helt onga meining vera í, at gørnini vórðu standandi, til sáttmálakreppan er loyst.

– Vit hildu tað vera skeivt at lata gørnini standa og fiska, meðan stríðið er, tí tað gongur útyvir fiskastovnin, sigur hann.

Eingin gongd er í samráðingunum í løtuni, og Ellintur M. Abrahamsen sigur seg slett ikki duga at meta um, hvussu drúgt hetta stríðið verður.






*Áhugin fyri føroyskum sjónvarpi er stórur, staðfestir SvF-stjórin Mikkjal Helmsdal út frá Gallup-kanning. Hyggjarakanningar verða fast innbúgv á sjónvarpinum frameftir, so hann altíð veit, hvussu SvF stendur seg í kappingini um hyggjaran*

# Vit elska føroyskt sjónvarp

**Dagur og vika savnar helvtina av føroyingum framman fyri skíggjan hvørt kvøld. Undirhaldssendingar nar eru ikki heilt so væl umtóktar, men ein hyggjarakanning prógvar, at skal sjónvarpinum verða lív lagað, so er føroyskt tilfar einasti vegurin fram**

KANNING
*Ingi Rasmussen*

Føroyingar elska føroyskt sjónvarp. Um sendingarnar eru føroyskar væl at merkja.

Tað vísa úrslitini frá einari kanning, sum Gallup hevur gjørt fyri Sjónvarp Føroya.

Tølini byggja á tvær hyggjarakanningar. Onnur varð gjørd somu vikuna, sum vetrarskráin byrjaði, tað er 15.-21. september, og hin varð gjørd 11.-16. november.

Kanningin vísir, at tað eru føroysku sendingarnar, sum draga fólk til Sjónvarp Føroya, meðan tær útlendsku sendingarnar sum heild liggja langt undir í hyggjaraáhuga.

## Føroyskt vinnur

Dagur og vika er enn sum áður flaggskipið hjá SvF, ið siglir frá øllum hinum. Sambært kanniningin hyggja umleið helvtin av føroyingum eftir Dag og viku hvørt kvøld.

Onkran dag er talið heilt uppi á 60 prosentum, og tað munnu vera tøl, sum altjóða tíðindarásir hyggja langtandi eftir.

Tað er eisini áhugavert, at fólk ikki tykjast at zappa aftur og fram, tá Johnsigurd Johannesen og Sigrún Brend vitja í stovuni. Gallup hevur eisini kannað, hvussu stóran part av sendingini, fólk síggja. Og har sæst, at tey, sum tendra fyri sjónvarpinum, tá Dagur og vika er á skíggjanum, síggja sendingina á tamb.

Áhugarvert er tað eisini, at útvið 5 prosent av føroyingum, ella 1.752 fólk, hugdu at teknmálstulkaðu tíðindasendingini í november.

Aðrar aktuellar sendingar, so sum Breddin og Kjakið hava ikki havt heilt somu undirtøku sum Dagur og vika, men kortini hevur umleið fjórði hvør hyggjari sæð hesar sendingar í september og triði hvør í november.

## Væl dámt undirhald

Stóra satsingin hjá SvF í vetur er spurnakappingin SATSA. Hon er løgd í bestu senditíð leygarkvøld og er ætlað at verða ein kapping fyri øll, har eisini hyggjarin kann luttaka í kappingini. Sostatt er meiningin, at hetta er sendingin, sum savnar familjuna Føroyar um eitt felags tiltak.

Um satsingin er eydnast, veldst um eygað, sum sær. Umleið 39 prosent søgdu seg hyggja at SATSA í november, meðan talið var góð 37 prosent í september. Eitt kvøld, tá útboðið er stórt á øðrum rásum, má sigast, at hetta er hampiligt, men kortini onki afturímóti, hvat Dagur og vika ger við føroyingar.

Borð um borð hevur verið ein onnur undirhaldssending á skránni hjá SvF í vetur, og sum frá leið stóð hon seg væl betur enn SATSA. Í september sá umleið triði hvør føroyingur sendingina, men talið hækkaði heilt upp í 45 prosent í november.

## Útlendskt tapir

Tølini vísa sum heild, at Sjónvarp Føroya hevur stak góða undirtøku millum føroyingar. Samstundis kann staðfestast, at útlendsku sendingarnar fáa nógv minni ans.

Talið av hyggjarum kemur sjáldan upp um 10 prosent, og ein altjóða successrøð sum Ally McBeal fekk bara vitjan av 3987 fólkum, ella 11,34 prosentum, tá hon varð send fyri síðstu ferð. Av tí útlendska eru tað mest sum bara onkur hissini aktuell dokumentarsending, ið fær hyggjaratølini upp um tey 10 prosentini.

Hinvegin er góði gamli Inspector Morse ikki at kimsa at, tí umleið fimti hvør hyggur at honum. Danski Olsen-bandin ber kortini prísin, tí 11145, ella sløk 32 prosent hugdu at seinasta kvettinum í november.

Kanningin fær onki sagt um barnasendingarnar, sum Sjónvarp Føroya annars hevur gjørt nógv við síðsta árið, tí bara fólk yvir 15 ár eru spurd í kanningini.

Sjónvarpsstjórin:

# Tað loysir seg at endursenda

**Hyggjarin tekur væl ímóti tilboðnum at síggja føroyskar sjónvarpssendingar umaftur, staðfestir Mikkjal Helmsdal sjónvarpsstjóri út frá einari Gallupkanning. Frameftir fær hann seks hyggjarakanningar um árið at leggja programpolitikk eftir**

SJÓNVARP
*Ingi Rasmussen*

Føroyskar sendingar verða endursendar bæði eina og tvær ferðir í Sjónvarpi Føroya.

Fleiri hava alment funnist at hesum politikki, men atfinningarnar verða gjørdar til skammar í einari hyggjarakanning, sum Gallup hevur gjørt fyri SvF.

Sambært kanningini taka hyggjararnir væl ímóti tilboðnum at fáa fleiri høvi at síggja tær føroysku sendingarnar. Kanningin, sum varð gjørd í november, vísir, at í meðal 16,3% av øllum føroyingum yvir 15 ár, ella 5640 fólk, hyggja eftir føroyskum sendingum, tá tær verða sendar aðru og triðju ferð.

Mikkjal Helmsdal sjónvarpsstjóri sigur, at hann ikki hevur viljað gjørt viðmerkingar til nógvu atfinningarnar ímóti endursenda tilfarinum. Men nú hevur hann fingið sjón fyri søgn, at tað loysir seg.

– Sjónvarpsmynstrið í dag er øðrvísi enn fyri bert fáum árum síðan. Tá sat hyggjarin og hugdi, hvørja ferð okkurt føroyskt kom á skíggjan, men tað kunnu vit ikki rokna við longur, tí tilboðini eru so nógv. Tí geva vit fólkum hendan møguleikan at síggja sendingarnar aftur, og vit kunnu bara staðfesta, at fólk taka væl ímóti tilboðnum, sigur Mikkjal Helmsdal.

Kanningin staðfesti eisini nógv av tí, sum vit longu vistu, og hon hevur ikki givið stjóranum nakað óvæntað. Sjónvarp Føroya hevur stak góða undirtøku millum fólk, og tað fegnast stjórin sjálvandi um.

– Hendan kanningin skal brúkast til at leggja programmpolitikkin eftur, og vísa hvar vit flóta. Hon vísir, at hyggjarin fyrst og fremst hevur áhuga í føroyskum tilfari. Sostatt skulu vit satsa upp á føroyskt tilfar saman við útlendskum góðskutilfari, sigur Mikkjal Helmsdal.

Einasta lítla vónbrotið í kanningini er, at sendingin SATSA ikki hevur fingið betri undirtøku, tí nógv orka er løgd í ta sendingina. Hinvegin síggja tølini betri út, tá endursendingarnar verða tiknar við, tí tá liggur hyggjarskarin oman fyri 50 prosent.

– Uttanlands verður sagt, at um rating-talið er oman fyri 40, so eru tey væl fyri. Um samanborið verður við útlendskar sjónvarpsrásir, so kunnu vit bara vera væl nøgd, sigur Mikkjal Helmsdal.

Frameftir skulu seks hyggjarakanningar gerast um árið. Tær skulu vera eitt fast amboð hjá sjónvarpinum at leggja ætlanir eftir. Tað verður kanska serliga áhugavert, nú sjónvarpslandslagið fullkomiliga er kollvelt.